# Øll elska Astrid Lindgren

**Astrid Lindgren – tann so nógv elskaða Astrid við Pippi, Emil úr Lønnebergi, Brøðrunum Leyvuhjarta, Ronju Ránsmansdóttir og øllum hinum, doyði í januar í ár. Skarin var stórur, sum fylgdi henn til hennara síðsta hvíldarstað, fremst gekk Pippi og tann hvíti hesturin við svørtu blettunum. DR2 heiðrar svenska høvundan við temakvøldið leygarkvøldið**



*– Eg havi altíð skrivað til barnið innan í mær sjálvari. – Øll menniskju kenna seg sum børn innast inni, eisini tá tey verða ordiliga gomul, plagdi Astrid Lindgren at siga*

– Barnið býr í okkum øllum, og eg skrivi til barnið innan í mær sjálvari, plagdi Astrid Lindgren at siga.

Tann lítla Astrid Lindgren vaks upp í Smálandi í Svøríki, og higani eru allir persónarnir í søgum hennara. Børnini í Dundurdali, Emil úr Lønnebergi, Pippi, Karlsson, Brøðurnir Leyvuhjarta og Ronja Ránsmansdóttir. Í sendingini leygarkvøldið fer Astrid Lindgren at greiða frá uppvøkstri sínum. Hon greiðir frá um vøkru smálendsku náttúruna, sum hon upplivdi so innarliga sum barn, at hon valla skilti tað sum vaksin. Hon greiðir frá um pápa sín, Emil, sum er fyrimyndin í skaldsøguni. Og um allar hinar persónarnar og serskøltarnar, sum tað ýður við í eini á bygd í Smálandi, og sum hevur hugbirt Astrid Lindgren til allar teir ódeyðiligu persónarnar.

Onkur av barnaminnunum hjá Astrid Lindgren eru beinleiðis endurgivin í bókmentum hennara. Vit vitja lítlu oynna, har Astrid og hini børnini spældu Robinson Crusoe og sendu ein fløskupost við orðaljóðinum: »vit eru strandað á hesi oynni í tveir dagar uttan brennivín og snús«.

Fløskuposturin endaði hjá ommu Astrid, sum avgjørt ikki helt hetta vera stuttligt. Men tað helt lítla Astrid, sum nógv ár seinni brúkti hesa hending í bókini »Pippi Smokkuleggur«.

Fyri Astrid Lindgren er barndómurin týdningamesta tíðin í lívinum. Hetta vísti hon so greitt í eini lítlari viðmerking, tá »Øll vit børn í Dundurdali« varð filmatiseraður. Tá segði mostir Astrid, sum var 105 ár, at hon vildi vera við í filminum. »Jamen, hvønn leiklut vilt tú hava?«, varð hon spurd. »Vilt tú spæla eina gamla langommu?«. »Nei, eg vil verða ein av smágentunum í Dundurdali«, segði gamla mostirin.

– Menniskju kenna seg sum børn innast inni, tá tey verða ordiliga gomul, var tá niðurstøðan hjá Astrid Lindgren.

Áðrenn vit leygarkvøldið fara at vitja Småland hjá Astrid Lindgren, so er filmur til alla familjuna á skránni – tað er virðislønta filmatiseringin av Ronju Ránsmansdóttir hjá Tage Danielson.

Ronja er dóttir ránsmannakongin Mattis og konuna Lovis. Ronja verður fødd eina nátt við stormi og torugangi á Mattisfjallinum við Mattisskógin. Men Mattis, pápi hennara, er líka glaður við veðrið, tí nú hevur hann fingið dóttrina Ronju – og hugsar tí ikki um annað.

Tá Ronja fyllir 11 ár, flytir einasti rættuligi mótstøðumaður hjá Mattis, hann eitur Borka, inn í hina helvtina av Mattisborgini. Saman við honum eisini sonurin Birk.

Ronja og Birk eru sum páparnir mótstøðufólk tá tey hittast á fyrsta sinni, men børnini læra tó skjótt at virða hvørt annað – og gerast vinir.

Hetta leggur Mattis til merkis, og hann heldur, at Ronja hevur svikið seg – og Birk hevur sjálvandi skuldina. Hann verður í øðini, meðan dóttirin og Birk fjala seg í eini bjarnaholu í skóginum. Nú er eingin á ránsmannaborgini glaður longur – hvørki Borka ella Mattis ella nakar av ránsmonnunum. Og heldur ikki Ronja ella Birk er serliga nøgd.

Hvat síðan hendir, vita øll, sum annaðhvørt hava lisið bókina ella hava sæð filmin. Og um onkur tykkara ikki hevur tað, so er at gleða seg til hendan filmin, sum varð heiðraður í Berlin við eini silvurbjørn á Filmsfestivalinum í 1985, har hann eisini fekk lesaravirðislønina frá dagblaðnum »Berliner Morgenpost«.

Eftir filmin leygarkvøldið er meira um »Ronju Ránsmansdóttir«. Danski tónleikarin, Sebastian, kendi væl Astrid Lindgren gjøgnum fleiri ára samstarv, og hann hevur gjørt ein heilan sangleik um Ronju.

»Ronja Ránsmansdóttir« var tann fyrsta av egnu sangleikunum, sum Sebastian sjálvur hevur sett upp í sangleikhúsinum Mastodontarnir – fyrst í eini uttanduraútgávu í Fredensborg Slotshave og seinni í Sirkusbygninginum í heystfrítíðini 2000. Í báðum førum varð spælt »fyri fullum húsum«, og síðani hava Sebastian og Mastodontarnir spælt vælumtókta familjusangleikin ferð eftir ferð. Temaleygardagur hevur kagað handan leiktjøldini í Sirkusbygninginum og tosað við Sebastian um samstarv hansara við Astrid Lindgren.




